# Reglugerð

## fyri

## Frítíðarskúlan í Fuglafjarðar kommunu

§ 1

Frítíðarskúlin, ið er kommunalur stovnur, er góðkendur við heimild í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt nr. 67 frá 10. mai 2000. Stovnurin hevur rætt til at fáa almennan studning sambært somu lóg og er skyldigur til at vera undir almennum eftirliti og fylgja teimum umsitingarligu fyriskipanum, ið eru ásettar sambært somu lóg.

§ 2

1.stk.
Endamál frítíðarskúlans er gerandisdagar í dagtímunum at hava umsorgan fyri, menna og menta børnum - í einum kristnum anda í tryggum viðurskiftum á námsfrøðiligan fullgóðan hátt – í 1. flokki og eftir 1. august 2003 í 2. flokki, sum eru búsitandi í Fuglafjarðar kommunu.

2.stk.
Javnstillað við 1.stk. er endamál frítíðarskúlans at samskipa tiltøk fyri børn, sum av fysiskum, sálarligum og sosialum orsøkum hava tørv fyri meiri stuðli enn tí, sum heimið megnar at geva.

§ 3

1.stk.
Fyri frítíðarskúlan skal veljast eitt foreldraráð, sum skal geva leiðaranum ráð og vegleiðing. Ráðið skal arbeiða fyri at bøta og styrkja um samstarvið ímillum foreldrini, frítíðarskúlan og kommununa.

2.stk.
Leiðarin tekur stig til, at eitt ráð verður sett. Í ráðnum skulu vera 3-5 limir, sum verða valdir fyri tvey ár ísenn. Fyri hvønn lim verður ein varalimur valdur.

3.stk.
Ráðið skal vera umboðað av foreldrum, sum hava børn á frítíðarskúlanum.

4.stk.
Kommunan ger viðtøkur fyri virksemi ráðsins.

§ 4

1.stk
Til tess at røkja dagligu leiðslu frítíðarskúlans setir kommunan ein leiðara. Býráðsleiðslan setir eftir tilmæli frá leiðaranum pedagogar og hjálparfólk í størv, sum annars eru neyðug á frítíðarskúlanum. Fólk, sum verða sett í starv eftir hesi reglugerð, verða lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag.

2.stk
Frítíðarskúlin hevur opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunan kann eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini geva loyvi til, at frítíðarskúlin kann hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum sambært § 3 stk. 2 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

3.stk.
Leiðarin hevur ábyrgdina av námsfrøðiligu leiðslu frítíðarskúlans og stendur fyri dagliga rakstrinum í samstarvi við kommununa.

4.stk.
Fuglafjarðar kommuna ger upptøkureglur, sum skulu góðkennast av landsstýrismanninum sambært § 4 stk. 2 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

5.stk.
Kommunan hevur ábyrgdina av, at gjaldið, ið foreldrini skulu lata, verður kravt, og førir leiðarin í samstarvi við annað starvsfólk hjáverubók, har tað hvønn dag verður sagt frá, hvørji børn, ið eru komin.

6.stk.
Leiðarin førir høvuðsbók við upplýsingum um tey børn, ið eru upptikin á frítíðarskúlanum, navn teirra og aldur, foreldur, og hvussu leingi tey vóru á frítíðarskúlanum, og um orsøkina til, at tey fóru av frítíðarskúlanum.

7.stk.
Leiðarin skipar fyri arbeiðsætlanum, frítíðarætlanum, sjúkraseðlum o.s.fr. Uppsøgn av starvsfólki verður framd í tráð við tær til eina og hvørja tíð galdandi reglur.

8.stk.

Leiðarin hevur ábyrgdina av, at óregluligar avgerðir ikki verða tiknar á frítíðarskúlanum. Um kommunan tekur avgerð, ið eftir uppfatan leiðarans er í stríð við galdandi reglur s.s sáttmáli o.t., hevur leiðarin skyldu til at boða kommununi frá hesum. Um kommunan ikki er samd við leiðaranum hesum viðvíkjandi, kann avgerð kommununnar kærast til Trivnaðarmálaráðið.

9.stk.
Er talan um størri útveganir, fer keypið fram, eftir at tilboð eru fingin til vega og løgd fyri kommununna til støðutakan.

10.stk.
Er talan um størri útreiðslur, sum ikki eru innan fyri góðkenda fíggjarætlan, kunnu útreiðslurnar ikki berast uttan góðkenning frá Fuglafjarðar kommunu.

## § 5

1.stk.
Tað áliggur leiðaranum saman við kommunalu fyrisitingini at gera uppskot til fíggjarætlan. Kommunan velur grannskoðara fyri stovnin. Hesin skal vera ríkisgóðkendur ella skrásettur.

## § 6

1.stk.
Eru foreldur í eftirstøðu fyri foreldragjald, kann barnið sigast upp eftir reglunum í kunngerð nr. 6 frá 25. januar 1995 " Kunngerð um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt".

2.stk.
Um barn er á bíðilista, hvørs tørvur verður mettur hægri enn tørvurin hjá upptiknum barni, er tað ikki uppsagnargrund.

3.stk.
Søkja foreldur um upptøku av barni/um teirra, hevur kommunan ikki loyvi at sýta teimum upptøku, um pláss er á frítíðarskúlanum.

## § 7

Fuglafjarðar kommuna kann broyta hesa reglugerð.

Reglugerðin er góðkend av Fuglafjarðar býráð tann 26. november 2002.

Fuglafjørður, tann 03. desember 2002

***Vegna Fuglafjarðar kommunu***

Sigurð S. Simonsen
Borgarstjóri

// Jákup Frants Larsen
býráðsskrivari